Fótbóltssamband Føroya
The Faroe Islands' F.A.
Member of FIFA - UEFA - ÍSF

P.O. Box 3028
Gundadalur
FO-110 Tórshavn
FØROYAR (FAROE ISLANDS)

Telefon +298 35 19 79
Telefax +298 31 90 79
e-mail: fsf@football.fo
website: www.football.fo

Peningasambond:
EIK Banki 9181 - 263.457.2

**Til feløgini**

Dagf.: Des 2016

Ref.: HV/ps

**Innbjóðing til B2 skeið í februar 2017**

Ætlanin er at hava tvey B2 skeið í februar 2017. Skeiðini eru hesi:

- 3-5 & 10-12. februar í Tórshavn
- 10-12 & 17-19. februar í Leirvík

B2 skeiðið er tilsamans 50 tímar og er fríggjadag klokkan 16-21, leygardag klokkan 8½-20 og sunnudag klokkan 8½-17.
Eitt skeið er treytað av nóg góðari undirtøku.

Endamál/innihald: B2 er framhald av B1 skeiðinum.
Skeiðið er bæði ástøðiligt og praktiskt og dentur verður lagdur á venjing við børnum og ungum.
Evni, sum verða viðgjørd á skeiðinum, eru m.a.:

- Teknisk venjing
- Likamlig venjing
- Leiðsla
- Læruhættir/metoda
- Málmansvenjing

Tað er ongin próvtøka, men kravt verður, at uppmøtingin er 100%. Tá skeiðið er av, verður luttøkubræv latið luttakarunum.
Tey, sum hava tikið B2 skeið, hava rætt til at søkja upptøku á B3 skeiðið, sum verður í november 2017.

Upptøkutreytir: Luttakari skal hava tikið B1 skeiðið og vera 18 ár ella eldri.

Luttøkugjald: Kostnaðurin fyri skeiðið, íroknað frálærutilfar og kost, er kr. 3.000 kr. – Konufólk rinda tó ikki luttøkugjald!

Tilmelding: Áhugað kunnu sjálvi tekna seg ella venda sær til egið felag, sum avgreiðir tilmeldingina. Tilmeldingin skal gerast umvegis elektronisku tilmeldingarskipanina hjá FSF. Far inn á www.FSF.fo , undir "Nethandil".
Umráðandi er við røttum upplýsingum um luttakaran: navn, føðidato, kyn, teldupost og tlf.
**Tilmeldingarfreistin er úti mikudagin 25. januar 2017.**

Meira fæst at vita um skeiðini við at venda sær til Petur á teldupostadressuni petur@fsf.fo ella á tlf. 291977.

Við ítróttarkvøðu

ATLANTIC AIRWAYS